Myndaframsýning hjá Hjalmari W. Høgnesen:

# Ein endurtøka av eini farnari tíð

**Á norðoyastevnu sýndi Hjalmar Waag Høgnesen úr Klaksvík fram myndir frá Kalsoynni. Nógv fólk vitjaðu framsýningina, og stuttligt var hjá nógvum at síggja gamlar myndir, har tey av sonnum kendu seg aftur – bæði hvat persónum og hendingum viðvíkur. Heini O. Heinesen var ein av teimum mongu, sum nýtti høvi til at vitja framsýningina**



*– Sum at endurliva eina farna tíð, lýsir Heini O. Heinesen myndaframsýningina hjá Hjalmari Waag Høgnesen á norðoyastevnu*

*Mynd: Jan Müller*

FRAMSÝNING
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:**
Hjalmar var skipari á Barsskor í nógv, nógv ár, og hesa tíðina nýtti hann ofta høvi til at taka myndir. Og upp gjøgnum árini hevur eitt ikki so lítið myndasavn rúgvað seg upp hjá honum. Og á norðoyastevnu sá ein partur av hesum myndasavninum dagsins ljós í auluni í skúlanum við Ósánna, har Hjalmar hevði framsýning saman við Norðoya Listafelag. Sagt varð, at yvir 700 fólk vitjaðu framsýningina hjá Listafelagnum, og sum skilst so var framsýningin hjá Hjalmari so bergtakandi, at tað er ilt at ímynda sær, at tey eru farin útaftur uttan at hava vitjað framsýningina hjá Hjalmari.

Millum tey, sum vóru og vitjaðu hesa framsýning, var Heini O. Heinesen, løgtingsmaður. Hann minnist sjálvur nógv til hetta tíðarskeiðið og longur aftur enn tað. Hann sigur, at hatta var eitt tað besta myndasavnið, sum hann nakrantíð hevði sæð.

– Myndirnar vóru so livandi, at tað var fyri meg sum at síggja ein film, sigur hann.

Nógvar gamlar myndir frá tí tíðini, tá Barsskor sigldi á Syðradal, Húsar, Kunoy, Mikladal og Trøllanes. Lítli bátur var eisini við á nógvum myndum, sum varð nýttur, tá tað ikki var gjørligt at leggja at.

Á nógvum myndum sást, hvussu var borið at, tá Barsskor var komin at. Um ikki líkindini vóru góð, og tað súvaði nógv, so sást týðuliga aftur á myndunum, hvussu alt gekk fyri seg, tá vøra og fólk skuldu í land. Ein kundi síggja fólk, sum passaðu sær løði til at leypa av bátinum á land. Fólk, sum kanska ikki vóru so von við hetta, og tískil ikki vóru heilt trygg við støðuna somuleiðis.

– Hatta var sum at uppliva eina farna tíð aftur. Tað var stuttligt at síggja myndirnar, og á tann hátt verða mintur á, hvussu tað var fyrr, greiðir Heini frá. Hann er ikki í iva um, at eitt tílíkt myndasavn, sum Hjalmar eigur, hevur stóran týdning fyri lokalsamfelagið.

Heini minnist aftur á tíðina, tá Barsskor eisini sigldi til Kunoyar, og hann greiðir frá, at tað var tann heilt stóra hendingin, at postbáturin kom til bygdina. Bygdafólkið plagdi at ganga og hyggja fyri at vita, nær báturin kom.

– Tað var so, at tá plagdi Barsskor at leggja at í Kunoy á veg norður til Mikladals og Trøllanes, og um onkur so skuldi avstað við Barsskor brádliga, so mátti man siga frá, tí so kom hann aftur á vegnum aftur til Klaksvíkar, greiðir hann frá. Og hann heldur fram, at tað kom ofta fyri, at fólk ringdu til Trøllanesar og bóðu tey boða skiparanum frá at leggja leiðina framvið Kunoy aftur.

– Onkuntíð kundi tað elva til eitt sindur av øsing, tí tað kundi vera ógvuliga ilsligt at sigla tvørtur um fjørðin, men væl bar kortini til, sigur Heini og flennir.

Serliga leggur Heini dent á, at myndasavnið hjá Hjalmari goymir nógvar persónar, sum ei longur eru í millum okkum.

– Har eru nógv søgulig virði um eina tíð, sum er farin. Og tá nýggja ferjulegan á Syðradali eisini er komin, tá kann tað væntast, at hetta púrasta fer í gloymibókina, og tá er tað av alstórum týdningi, at slík minni kunnu verða varðveitt sum longst, sigur Heini Heinesen at enda.

**Fornminnissavnið**

Hjalmar Waag Høgnesen eigur eitt sera stórt myndasavn. Og tað eru so sanniliga ikki bert myndir av Kalsoynni.

– Eg ætlaði at hava myndir aðrastaðni frá eisini, men ein má avmarka seg, sigur hann.

Meginparturin av myndunum eru frá 30 árum síðani og longur aftur enn tað.

Hjalmar sjálvur hevur ætlanir um at lata Norðoya Fornminnissavni myndirnar, tí hann heldur, at tær á henda hátt kunnu verða best varðveittar.

– Tað er við hesum sum við so nógvum øðrum. Tað ferst so skjótt. Fyrsta ættarliði goymir væl, men so koma fólk, sum ikki hava nakað serligt tilknýti til hesa farnu tíð, og so forfarast tær, sigur hann.

Hóast framsýningin hevði stóran áhuga millum tey vitjandi, so hevur Hjalmar ongar ætlanir um at hava fleiri framsýningar. Men hann fer tó væntandi at hava hesa framsýningina í tilhaldinum í Havn á Ólavssøku. å



*Myndirnar vóru tær flestu í litum, og tær sóuserstakliga livandi út*

*Mynd: Jan Müller*



*Myndasavnið hjá Hjalmari hevur eitt sera týdningarmikið søguligt virði, tí tað lýsir eina farna tíð*

*Mynd: Jan Müller*



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

### Minningarorð um systur okkara

# Mariu Nystrøm Egholm



Góða Mia!

Tað er svárt at skula skriva hesar reglur, nú tá tú ikki er her hjá okkum meira, saknurin er stórur, og enn hava vit ikki heilt skilt, at tú ert farin, hóast saknurin man vera størstur hjá manni og børnum. Tú var so leingi í Danmark til viðgerðar fyri sjúkuna, og ongantíð ivaðist tú í at tú kom heim aftur frísk og til reiðar at taka uppá teg allar tær skyldur, sum tú trúliga røktaði hvønn einasta dag, heima so væl sum til arbeiðis, men soleiðis skuldi ikki ganga.

Váharra hevði aðrar ætlanir við tær, hann legði tær lívið til rættis, og nú var títt lívsverk fullgjørt. Vit hava ofta ilt við at góðtaka, at okkara kærastu verða tikin frá okkum; í mongum førum á ein so meiningsleysan hátt, men ein meining er við øllum, og ongin hevur livað her á jørðini til fánýtis.

Eg minnist aftur á eina stórasystur, sum altíð var í gongd við okkurt, tíðin var ómetaliga virðismikil fyri teg, tað ráddi um um at nýta tíðina rætt, ikki var neyðugt at sita hendur í favn, heldur fáa okkurt á skaftið so leingi sum man sat niðri.

Hetta eyðkendi eisini heimið hjá tær, tá tú búði í Klaksvík, meðan børnini vóru smá og tøtt, har tú arbeiddi í Sparikassanum um dagin og umframt alt vanligt húsarhald eisini hevði matvøruhandil og har afturat hevði bókhald fyri ymisk feløg, har umframt settist tú ikki aftur, tá kvøldskúlarnir byrjaðu. Eisini gongutúrarnir vóru nógvir, og alt gekk sum smurt, júst tí tú dugdi at leggja tær alt til rættis.

Síðan tú flutti til Havnar, hevur tú heldur ikki ligið á tí latu síðuni, tvørturímóti var hvør dagur fult upptikin.

Eg var júst afturkomin úr Danmark, har eg hevði verið hjá tær eina tíð, tá eg fekk boðini, um at nú var tú farin. Hetta var ikki tað, sum vit báðar høvdu ætlað, við høvdu heilt aðrar ætlanir um njóta hetta summarið sum var á veg, men okkara leiðir eru ikki Hansara leiðir, og eg kann bara takka fyri, at eg fekk loyvi til at vera saman við tær hesar seinastu dagarnar, sum tú hevði heima á hotellinum, har sum vit høvdu tað so gott. Vit fara at fullføra okkara ætlanir um eitt gott summar, tá vit møtast aftur.

Vegna systrar, beiggja, svágrar, svigarinnu og mammu, vil eg við hesum orðum lýsa frið yvir minnið um okkara kæru Mariu.

Heilsan

**Eyðbjørg**

# Blómuhandilin Trónd Hansen letur aftur leygardagin



*Kolbrún Wardum gevst nú við blómuhandlinum á Áarvegnum*

Leygardagin 21. juni er blómuhandilin Sp/f Trónd Hansen á Áarvegnum í Havn opin fyri seinastu ferð. Handilin hevur røtur heilt aftur til 1920, tá Trónd Hansen í Havn, sum bleiv útbúgvin gartnari í 1904, tann 17. desember í 1920 lat upp handil, har hann seldi frukt og grønt. Hann hevði tá m.a. arbeitt sum gartnari í fleiri ár. Handilin var á Áarvegnum, har sum Liffa Arge Gregoriusen handlaði eina tíð. Tá Trónd Hansen doyði í 1939, rak dóttirin, Malan, handilin til 1943, tá hon giftist við Jóannes Patursson í Kirkjubø og flutti til Kirkjubøar at búgva. Tá helt einkjan eftir Trónd Hansen, Stephania, fram við at gera kransar og seldi rabarbur o.a. frá heimi sínum í Gundadali. Í 1962 fekk Stefania loyvi at byggja ein blómuhandil á Áarvegnum, yvir av Hotel Hafnia. Tá kom dóttur hennara, Augusta, at arbeiða har og rak hon handilin til 1975, tá Kolbrún Wardum, dóttir Maluna og Jóannes Patursson í Kirkjubø og ommudóttir Stephaniu, yvirtók handilin. Í 1989 bleiv gamli handilin tikin niður og ein nýggjur blómuhandil bleiv bygdur á sama staði. Handilin er í tveimum hæddum, ið eru 80 fermetrar hvør. Niðara hæddin er undir jørð.

Kolbrún Wardum er annars útbúgvin tekniskur teknari. Eftir at hava rikið handilin í 28 ár gevst hon nú leygardagin. Hølini verða leigað út til matstovu. Kolbrún sigur, at hetta hevur verið ein spennandi tíð, og hon hevur trivist væl í handlinum saman við sínum starvsfólkum og viðskiftafólkum. Hon nýtur samstundis høvið at takka øllum sínum viðskiftafólkum fyri álit og trúfesti hesa tíðina, tey hava verið á Áarvegnum.




## Dagurin

20. juni. Sylverius, deyður í 537. Hann var sonur pávans Hormisades og gjørdist seinni sjálvur pávi, men av politiskum grundum varð hann skjótt frákoyrdur. Navnið merkir skógarbúgvi.